# Javnaðarflokkurin: Skal vera bíligari at brúka Vágatunnulin

**–Teir flokkar, sum kravdu, at eitt alment partafelagskuldi gera Vágatunnilin, mugu nú eisini siga okkum, hvussu brúkagjaldið fæst niður á eitt rímiligt støði. Gera teir onki, fer okkurt at henda**

VÁGATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*

– Tað skal vera bíligari at koyra ígjøgnum Vágatunnilin.

Tað heldur javnaðarflokkurin.

Javnaðarflokkurin var hart ímóti at lata eitt alment partafelag gera Vágatunnilin ístaðin ístaðin fyri at lata Landsverkfrøðingin standa fyri arbeiðnum, soleiðis sum vit altíð hava gjørt.

Men nú tunnilin er liðugur, eru tað nógv sum halda, at gjaldið fyri at koyra ígjøgnum hann, er alt ov høgt.

Og tað er javnaðarflokkurin samdur í.

Jóannes Eidesgaard, formaður í javnaðarflokkinum, sigur, at gjaldið er ov høgt og at tað verður neyðugt at seta tað niður á eitt rímiligt støði.

Men hvussu tað skal gerast, hevur hann onki boð upp á enn.



### Hava skyldu at koma við eini loysn

Men í øllum førum heldur hann, at teir flokkar, sum settu Landsverkfrøðingin til viks og kravdu, at eitt alment partafelag skuldi stovnast at gera tunnilin, nú eisini hava skyldu til at greiða frá, hvussu gjaldið kann fáast niður.

Teir flokkarnir eru fyrst og fremst fólkaflokkurin, væl stuðlaður av sambandsflokkinum og sjálvstýrisflokkinum.

*– Vit eiga at seta eina nágreiniliga kanning í verk fyri at vita, hví Vágatunnilin er vorðin 40 milliónir dýrari enn ætlað, sigur Jóannes Eidesgaard, formaður javnaðarfloksins*

– Tað er tað minsta, teir skylda bæði vágafólki og øllum Løgtinginum, sum tók undir við at gera tunnilin, nú brúkaragjaldið er blivið so høgt, at tað ikki er til at liva við.

– Tað er hvørki at liva við hjá privatfólki, men tað er eisini kappingaravlagandi hjá vinnuni í Vágum, ikki minst í sambandi við, at fiskur verður keyptur á uppboðssøluni, tí nú verður tað dýrt at føra hann vestur. Hann sigur, at tað eru ikki so nógvir møguleikar fyri at fáa prísin niður.

Antin betalir landið ein størri part av tí, sum tunnilin kostar, tí tað er ongin sum sigur, at býtið ímillum landið og partafelagið er tað rætta í hesum føri. Ein annar møguleiki er, at landið rindar tað, sum tað kostar at reka tunnilin. Í øllum førum má ein loysn finnast, so at byrðan hjá partafelagnum lætnar fyri at brúkaragjaldið kann setast niður.

Annars heldur hann, at tað er ein spurningur, um tað er rætt, at bara tey, sum skulu brúka Vágatunnilin, skulu betala fyri tað, samstundis sum tað er ókeypis at brúka allar aðrar tunlar og brýr í landinum.

### Má takast upp

Men hann leggur afturat, at ger ongin nakað, er tað greitt, at so fer onkur annar at taka málið upp politiskt. Men um tað verður javnaðarflokkurin, sum fer at taka málið upp, vil hann ikki siga enn.

– Fyribils eru vit áskoðarar til hetta málið og vit ætla at fylgja gjølliga við. Vit eru samd um, at prísurin, sum nú er ásettur, kann ikki verða tann endaligi prísurin. Útfrá tí fara vit at vita, hvussu leikur ferð.

Jóannes Eidesgaard vísir á, at hetta er fyrstu ferð, at vit byggja samferðsluna út eftir hesum leistinum.

– Hetta er fyrstu ferð, at tað ikki er ein samfelsagsuppgáva burturav at byggja samferðsluna út. Og tað verður í hvussu so er neyðugt at brúkaragjaldið verður lækkað, so at fólk verða eggjað til at at brúka tunnilin.

– Tað ringasta, sum kann henda, er, at fólk ikki fara at brúka tunnilin, tí tað er ov dýrt, so at vit koma at liggja við einum deyðun verklagi, so at onngin nytta fæst burturúr tí peningi, sum brúktur er.

Hann heldur, at tað er alneyðugt at taka trupulleikan við brúkaragjaldinum upp, ikki bara fyri at loysa hendan trupulleikan, men eisini fyri at vita, um hetta gevur okkum at hugsa um, nú Norðoyatunnilin skal gerast.

### Meirnýtsla má kannast

Ein annar trupulleiki, sum nú hevur stungið seg upp, er, at tunnilin er blivin 40 milliónir dýrari, enn ætlað. Sostatt er tunnilin 17% dýrari enn hann skuldi vera, og tað verður mett at vera eitt stórt frávik.

– Vit vita ikki, hví tunnilin er dýrkaður so nógv, um tað er tí, at nevndin í partafelangum ikki hevur verið nóg ansin, um tað er tí, at hon hevur tikið skeivar avgerðir, ella um tað eru heilt aðrar orsøkir, sigur formaður javnaðarfloksins.

– Í øllum førum haldi eg Vinnumálastýrið eigur at biðja nevndina fyri Vágatunnilin um eina nágreiniliga frágreiðing um, hví tunnilin er dýrkaður heilar 40 milliónir og sat seta eina kanning í verk fyri at finna orsøkirnar. Og hendan frágreiðing og kanning eigur at verða løgd fyri Løgtingið, so at eisini tingið fær at vita, hví tað dýrkjaði so nógv, heldur Jóannes Eidesgaard.

# Heini O. Heinesen: Nú ræðast teir sítt egna barn

**Formaður tjóðveldisfloksins á tingi heldur, at Løgtingið má fáa eina frágreiðing uppá, hví Vágatunnilin er 17% dýrari enn ætlað**

VÁGATUNNILIN
*Áki Bertholdsen*

Tað hevði verið rætt at rætt at Løgtingið fær eina frágreiðing um, hví Vágatunnilin er blivin 40 milliónirdýrari enn ætlað.

Tað heldur Heini O. Heinesen, formaður tjóðveldisfloksins á tingi.

Hann var tann einasti, sum atkvøddi blankt, tá ið uppskotið um at stovna partafelagið varð til viðgerðar í tinginum.

Hann hevur ikki stórvegis viðmerkingar til Vágatunnilin í løtuni, tí tað er so nýtt, at tunnilin er dýrkaður, men ein frágreiðing um, hví tunnlin kostar 275-280 milliónir ístaðin fyri 240, sum ætlað.

Men hann sigur, at tað er greitt, at tað dýrkar eina ætlan sum hesa, tá ið hon skal fíggjast við lántøku, tí tað kostar rentur at taka lán.

Men ikki minst vágatingmenn vóru altráðir eftir at fáa partafelagið sett á stovn, tí ongin onnur loysn kundi brúkast.

Men nú úrslitið fyriliggur, ræðast teir sítt egna barn.

Men hetta eigur ikki at koma óvart á nakran, tí tá ið tunnlin var til viðgerðar, vísti hann fleiri ferðir á, at tað var skeivt at lata eitt partafelag gera tað heldur enn at lata Landsverkfrøðingin standa fyri arbeiðnum.

Brúkaragjaldið hevur hann heldur ikki so stórar viðmerkingar til. Men tá ið farið varð undir arbeiðið, vóru tað summi, sum droymdi um, at tað fór at kosta einar 50 krónur at koyra ígjøgnum tunnulin, men tað vistu vit, var heilt órealistiskt, tá ið hesin leisturin við almennum partafelag og lántøku, varð valdur.

Um hetta eigur at fáa avleiðingar fyri, hvussu arbeiðið at gera Norðoyatunnilin skal skipast, dugir hann ikki at siga enn.

– Tað er samtykt av stovna partafelag og tað nyttar onki a muta ímóti, tí so fært tú bara at vita, at tú ert ímóti at tunnilin verður gjørdur, hóast veruleikin er, at gjørdi Landsverkfrøðingurin tunnilin, var langt síðani koyrandi undir Vestmannasundi.

*Hetta eigur ikki at koma óvart á nakran, tí eg ávaraðu teir fleiri ferðir*





# Ongin er sum mamma

**Familjan eigur sjálv at gera av, hvør skal vera heima hjá barninum tað fyrsta árið, tykist ein greiður meiriluti av løgtinginum at halda. Sostatt fær tað ikki undirtøku, at ein pápakvota skal setast á eitt longt barnsburðarfarloyvi. Fleiri tingmenn hildu fyri, at mamman var tann einasta, sum kundi brúkast at vera heima hjá barninum**

BARNSBURÐUR
*Ingi Rasmussen*



*Boppan og barnið. Mamman eigur at bera allan barnsburðin, halda løgtingsmenn*
*Mynd Jens K. Vang*

»Fátt er sum faðir, ongin er sum móðir.«

Gamla orðatakið varð tikið í nýtslu, tá løgtingið fríggjadagin viðgjørdi uppskotið um barnsburðarfarloyvi í tinginum. Og tað var hetta, sum ein stórur partur av kjakinum snúði sum um. Hvør eigur at vera heima hjá barninum. Mamman ella pápin.

Allir flokkar brúktu barnsburðarfarloyvið sum valagn síðsta løgtingsval, og teir tóku eisini undir við at leingja skipanina upp í 12 mánaðir, tá tað var til viðgerðar fríggjadagin. Summir hildu kortini fyri, at tað var skilabetri at leingja tíðarskeiðið stigvíst og geva fult lønarendurgjald so hvørt tíðin økist.

### Mamma er best

Tað gongur út yvir kvinnurnar á arbeiðsmarknaðinum, um tær einsamallar skulu vera heima hjá barninum í eitt heilt ár. Tað kann føra við sær, at arbeiðsgevarar aftra seg við at seta kvinnur í góð størv og teirra lønarviðurskifti versna í mun til menn.

Eitt nú Javnstøðunevndin og Starvsmannafelagið hava tí nevnt møguleikan, at pápar skulu tvingast at taka ein part av økta farloyvinum.

Sjónarmiðini um hetta vóru ógvuliga ymisk í tinginum.

– Fátt er sum faðir, men ongin er sum móðir, tók Kári P. Højgaard úr Sjálvstýrisflokkinum til, tá hann umrøddi møguleikan. Hann helt lítið um, at pápar skulu heim at ansa børnum.

– Vit flyta alla tíðina mørk í samfelagnum, men vit kunnu ikki broyta tann veruleika, at móður og barn er tætt knýtt. Ein løgtingsnevnd kann ikki broyta tann veruleikan. Eg vildi heldur ynskt, at mamman kundi verið heima hjá barninum, líka til tað var komið undan, segði Kári P. Højgaard.

### Í sama báti

Miðflokkurin og Fólkaflokkurin vóru í sama báti sum sjálvstýrismaðurin í hesum máli.

– Tað er ikki ein trupulleiki, at kvinnurnar eru ov nógv heima. Trupulleikin er, at tað føðast ov fá børn. Um vit kunnu bera soleiðis í bandi, at vit fáa fleiri børn, og at kvinnurnar eru meira heima, so er nógv vunnið. Tí so vinna vit á skeiva aldursbýtinum, sum eyðkennir samfeløgini í vesturheiminum, segði Jenis av Rana úr Miðflokkinum.

Heðin Zachariassen duldi heldur ikki, hvør hoyrdi heima hjá børnunum og grýtunum.

– Tað er ein stórur fyrimunur, um vit lata foreldrini velja sjálv, hvør skal vera heima og ansa børnini. Tað er sjálvandi gott, um pápin kann vera heima og hjálpa til, men í mínari verð er ongin ivi um, hvør er betri egnað. Tað er mamma, sum klárar tey tingini best, segði Heðin Zachariassen.

### Vandi hjá kvinnu

– Hetta er dovin manschauvinisma, segði Kristian Magnussen.

Framsøgumaðurin hjá Javnaðarflokkinum stóð nakað einsamallur við síni meining, at mamman og pápin skulu býta øktu barnadagarnar sínámillum.

– Vit mugu taka útgangsstøði í tørvinum hjá allari familjuni, og harvið eisini mammuni. Kvinnan hevur tað nóg trupult á arbeiðsmarknaðinum, tá hon er burtur í eitt hálvt ár. Um hon einsamøll skal bera barnsburðarfarloyið, so er hon í vanda fyri at vera burtur frá arbeiðsmarknaðinum í fleiri ár, segði Kristian Magnussen.

# Vandi fyri misnýtslu av tænastuferðum

**Skipanin við avsláttarstigum fyri ferðing verður tambað. Summi fólk, sum ferðast í almennum ørindum, velja sær dýrastu ferðaseðlarnar og hotellini fyri at fáa flest bonusstig, sigur ein kelda í ferðavinnuni. Almenna ferðingin er nógv økt síðstu árini**

ALMENN FERÐING
*Ingi Rasmussen*

Nøkur heilt fá í høgum almennum størvum hava misnýtt EuroBonus-skipanina upp á tað grovasta.

Tað sigur ein álítandi kelda við tilknýti til ferðavinnuni við Sosialin.

EuroBonus-skipanin er strangt persónlig. Tá tú ferðast við ávísum flogfeløgum, sum eru í við í einum felagsskapi nevndur Star-alliance, fært tú bonusstig. Tað vil siga, at hóast tú ferðast fyri tað almenna, so fært tú persónliga tey bonusstigini, sum ferðin gevur av sær.

### Dýrasta veg

Tey flestu uppføra seg hampiliga og keypa teir bíligastu ferðaseðlarnar, tá tey fara uttanlands á skeið ella fund fyri tað almenna. Men nøkur fá gera sær dælt av skipanini.

Skulu tey langan veg til eitt nú handilssamráðingar, verður farið dýrasta veg. Tey velja at flúgva við eitt nú SAS, hóast onnur feløg kunnu vera nógv bíligari, og tey búgva á Radison, tí tað gevur flest bonusstig. Dømi eru eisini um, at fólk óneyðuga eru farin til onnur lond á vegnum fyri at fáa sær nøkur eyka bonusstig, sigur okkara kelda, sum hevur selt ferðaseðlar.

Tað eru tey fægstu, sum starvast hjá tí almenna, ið fáa savnað sær nóg mikið av stigum til, at tað ger mun. Fyri at fáa eina ókeypis ferð til Danmarkar burturúr, skalt tú t.d. ferðast átta ferðir aftur og fram, áðrenn tú hevur nóg mikið av stigum. Men tað eru nøkur, sum ferðast ofta. Rættiliga ofta.

### Nógv økt

Eitt yvirlit, sum Fíggjarmálastýrið hevur gjørt, vísir, at ferðaútreiðslurnar eru hækkaðar óhugnaliga nógv frá 1997 til 2001. Tað skrivaði Fregnir tann 13. september.

Í 1997 vóru ferðaútreiðslurnar hjá tí almenna góðar 12 milliónir krónur. Men í 2001 ferðaðust fólk fyri 20 milliónir krónur. Tað er ein vøkstur upp á sløk 70 prosent eftir fýra árum.

Hetta hevur Fíggjarmálaráðið eftir øllum at døma sett sær fyri at gera nakað við. Men í staðin fyri at skerja ferðingina upp á landsins besta, og heldur enn at forða fyri misnýtslu av bonusferðum, fer Fíggjarmálaráðið eftir bonusstigunum hjá tí einstaka. Roynt verður at skipa soleiðis fyri, at bonusstigini, sum fólk hjá tí almenna fáa, fella til stovnarnar.

Stovnsleiðarar hava fingið eitt bræv, undirskrivað av Karsten Hansen landsstýrismanni, har sagt verður, at stovnarnir hava skyldu til at tryggja, at vunnin bonusstig verða nýtt til tænastulig endamál. Tann einstaki stovnurin verður tí biðin um at fara undir mannagongdir, ið kunnu upplýsa starvsfólkini um reglurnar um innvinning av ymsum avsláttarskipanum.

»Stovnurin eigur at skráseta tey vunnu bonusstigini og veita vissu fyri, at hesi vera nýtt til framtíðar tænastuferðir,« sigur Karsten Hansen í brævinum til stovnarnar.

Hvussu stovnsleiðararnir skulu fremja hetta, sigur søgan onki um, tí stigini eru strangt persónlig váttar EuroBonus fyri Sosialinum.

**Fakta**

EuroBonus-skipanin gevur tær stig, tá tú flýgur á ávísum leiðum hjá einum felagsskapi av flogfeløgum.

Tú kanst savna tær stig, og tá tú hevur nóg mikið av stigum fært tú eina ókeypis ferð.

Tú fært t.d. 2400 stig fyri eina vanliga ferð fram og aftur til Keypmannahavnar. Savnar tú 20.000 stig innan tvey ár, fært tú eina ókeypis ferð.